## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og regn og mjørki. Seinnapartin sama vindferð av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin m,illum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Atlantic Petroleum framleiðir nú á tveimum leiðum

**Ettrick-leiðin hjá Atlantic Petroleum byrjað at framleiða, og er samlaða framleiðslan sostatt økt munandi**

OLJA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum kann nú fegnast um, at enn ein av teirra oljuleiðum er farin í framleiðslu. Frammanundan vinnur felagið olju úr Chestnut leiðini, men við framleiðslu frá enn einari leið, Ettrick leiðini, hevur felagið rokkið enn einum máli.

Báðar tær framleiðandi leiðirnar liggja í enska partinum av Norðsjónum.

-Vit eru sera fegin um, at framleiðslan úr Ettrick-leiðini nú er byrjað. Saman við Chestnut hava vit nú tvær framleiðandi oljuleiðir, sum geva eina týðandi inntøku til felagið. Við hesum hava vit eitt sera gott støði at byggja okkara víðari vøkstur á. Vit fara at miðja ímóti at leggja virðir afturat Ettrick-leiðini við at optimera framleiðsluna, áðrenn fleiri útbyggingarbrunnar verða boraðir, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum.

Hann leggur afturat, at harafturat verður kannað nærri, um Blackbird-leiðin, ið liggur skamt frá Ettrick, kann útbyggjast og fara í framleiðslu. Blackbird-leiðin varð funnin í 2008. Eisini verður møgulleikin kannaður at knýta aðrar minni leiðir í økinum uppí Ettrick.

Ettrick oljuleiðin fer væntandi at framleiða 1.650 tunnur av olju um dagin til Atlantic Petroleum. Atlantic Petroleum hevur ognarpartar í 16 ymiskum oljuleiðum í Norður Evropa.



### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Ein hátrýstyggur, 1014 hPa. yvir Føroyum fer eystureftir. Eitt lágtrýst, 985 hPa. í landsynning úr Hvarvinum stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í kvøld.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing norðan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/08 kl. $06^{00}$ – 13/08 $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í august: +0,4° -
Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 12/08 kl. $06^{00}$ – 13/08 $06^{00}$.
Avfallið higartil í august: 32 mm




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

13. august Seinna kvarter
19. august Mánin næstur jørðini
20. august Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18.aug | 05:21 | 17:50 | 04:21 | 16:50 | 04:36 | 17:05 | 07:21 | 19:50 | 08:21 | 20:50 | 03:36 | 16:05 | 02:36 | 15:05 | 05:36 | 18:05 | 06:36 | 19:05 | 05:06 | 17:35 | 06:21 | 18:50 |
| 19.aug | 06:16 | 18:42 | 05:16 | 17:42 | 05:31 | 17:57 | 08:16 | 20:42 | 09:16 | 21:42 | 04:31 | 16:57 | 03:31 | 15:57 | 06:31 | 18:57 | 07:31 | 19:57 | 06:01 | 18:27 | 07:16 | 19:42 |
| 20.aug | 07:08 | 19:34 | 06:08 | 18:34 | 06:23 | 18:49 | 09:08 | 21:34 | 10:08 | 22:34 | 05:23 | 17:49 | 04:23 | 16:49 | 07:23 | 19:49 | 08:23 | 20:49 | 06:53 | 19:19 | 08:08 | 20:34 |
| 21.aug | 07:59 | 20:24 | 06:59 | 19:24 | 07:14 | 19:39 | 09:59 | 22:24 | 10:59 | 23:24 | 06:14 | 18:39 | 05:14 | 17:39 | 08:14 | 20:39 | 09:14 | 21:39 | 07:44 | 20:09 | 08:59 | 21:24 |
| 22.aug | 08:48 | 21:12 | 07:48 | 20:12 | 08:03 | 20:27 | 10:48 | 23:12 | 11:48 | - | 07:03 | 19:27 | 06:03 | 18:27 | 09:03 | 21:27 | 10:03 | 22:27 | 08:33 | 20:57 | 09:48 | 22:12 |